

MYND: ALVUR HARALDSEN

Effodeildin støðan

NR.	LIÐ	DYSTIR	VUNNI	JAVNT	TAPT	+ MÁL	- MÁL	+/-	STIG
1	NSÍ	8	6	0	2	22	14	+8	18
2	B36	8	5	2	1	18	9	+9	17
3	Víkingur	8	3	5	0	21	12	+9	14
4	HB	8	3	3	2	12	11	+1	12
5	KÍ	8	3	2	3	14	11	+3	11
6	ÍF	8	2	5	1	14	12	+2	11
7	TB	8	1	5	2	10	12	-2	8
8	FC Suðuroy	8	2	0	6	9	23	-14	6
9	AB	8	0	5	3	7	11	-4	5
10	EB/Streymur	8	0	3	5	8	20	-12	3

Málverjin Ivan Stojkovic varð vístur av vøllinum. Tá fór Patrik Johannesen, sum annars er framrættaður miðvallari, at verja málið. Burtursæð frá fyrsta frísparkinum, sum fór beinleiðis í málið, so fór eingin bóltur framvið Patriki.

Hesa vikuna hava teir arbeitt við, hvør skal verja TB málið í Streymnesi. Upplagdi avloysarin er Hugin Albinus, sum er eykamálverji. Tað kemur illa við, at hann ikki er tøkur.

– Vit hava spurt okkum fyri hjá FSF, hvussu møguleikarnir eru at leiga ein málverja, men tað ber neyvan til, og spurningurin er, hvør er tøkur. Í løtuni bendir tað á, at Patrik Johannesen fer at verja málið ímóti EB/Streymi. Hann var málverji í ungdómsdeildunum, og tað sást ímóti ÍF, at hann var ikki heilt óvanur við støðuna, sigur Charlotta Nielsen, sum er samskipari hjá TB.

Í EB/Streymi vóru teir sera vónbrotnir eftir 2-1 tapið í Vági, sum bar við sær, at EB/Streymur undan 9. umfari er niðast á støðutalvuni.

– Vit kunnu taka góða hugburðin ímóti FC Suðuroy við okkum. Spælararnir arbeiddu nógv undir vánaligum umstøðum. Nú fokusera vit á avbjóðingina á heimavølli ímóti TB. Talan er um so nevndan seks stiga dyst, og harvið er týdningurin sera stórur fyri okkara møguleikar at røkka málinum, sum er at varðveita plássið í deildini, sigur Niels Pauli Danielsen, liðformaður í EB/Streymi.

Higartil hevur EB/Streymur ikki vunnið. Talan er um tríggjar javnleikir og fimm tap.

Fuglfirðingar skulu reisa seg

ÍF - FC SUÐUROY KÁRI J. Á HØVDANUM
Sunnudagin kl. 15.00

Lagið var ikki gott í ÍF leguni eftir síðsta bríksl síðsta sunnudag við Stórá í Trongisvági. Fulgfirðingar høvdu tá verið ellivu ímóti tíggju í meiri enn ein tíma, men kortini eydnaðist tað ikki at vinna.

ÍF venjarin, Aleksandar Jovevic fílist á avrikið:

– Vit stríddust ikki nóg væl, tí teir vunnu nærdystirnar og returbóltarnar, og vit megnaðu ikki at samanspæla fram eftir vøllinum. Vit sparkaðu ov nógv.

Hjá ÍF kemur tað væl við, at Bartal Eliasen er tøkur aftur eftir leikbann. Harvið verður Karl Løkin fluttur úr miðverjuni og fram aftur á miðvøllin, har hann er álitið. Tað eigur at vera styrkur hjá ÍF, at Adeshina Lawal er tøkur aftur eftir leikbann tríggjar tær seinastu ferðirnar.

Tølini siga, at ÍF stendur seg væl betri á heimavølli enn aðra staðni. Higartil er úrtøkan sigrar á KÍ og B36 og javnleikur ímóti HB.

Lagið er gott í FC Suðuroy leguni, eftir at tað sunnudagin við 2-1 sigri á EB/Streymi eydnaðist liðnum fyri fyrstu ferð síðani uppflytingina at lyfti seg upp um niðurflytingarstrikuna.

Seks stig eru vunnin burtur úr trimum teimum seinastu umførunum. Í triðja dystinum misti FC Suðuroy javnleikin ímóti HB á stokkinum.

– Heimavøllurin er nú soleiðis, sum vit høvdu vónað. Takið verður nú eisini at vinna úrtøku á útivølli. ÍF í Fuglafirði er stór avbjóðing, men tað telur nógv, at hugburðurin er so góður, sum tað sást ímóti EB/Streymi, sigur Jón Krosslá Poulsen.



MYND: SIGMAR MØRKØRE

NSÍ stuðlarnir eru tøkir aftur

NSÍ - KÍ PÁLL AUGUSTINUSSEN
Sunnudagin kl. 15.00

Eftir stóra NSÍ tapið í Sarpugerði sunnudagin og annan KÍ heimasigurin á rað er nýggjur spenningur undan uppgerðini við Løkin. KÍ hevur eftir soltnu fyrstu umførini nú møguleika at lyfta seg nærri toppliðunum.

– Vit eru nøgdir við hugburðin, sum vit vístu ímóti AB. Spælið var ikki altíð so gott, og kanska spældu umstøðurnar inn. Nú bíðar enn ein stór uppgáva. NSÍ hevur staðið seg væl higartil, men vit rokna avgjørt við møguleikanum, at tað skal eydnast okkum at vinna. Men tað krevur øgiliga nógv av okkum, sigur Hjalgrím Elttør, sum var heilt væl upplagdur ímóti AB.

Í NSÍ ásanna teir, at teir á ongan hátt megnaðu at halda tørn ímóti Víkingi, sum vann 5-1. Teir rokna við, at fyritreytirnar eru væl betri ímóti KÍ, enn tær vóru í Gøtu. Fleiri lyklaspælarar vóru ikki tøkir ímóti Víkingi. Eitt skifti kvíddu teir fyri, at Árni Frederiksberg var langtíðarskaddur. Tað var hann ikki. Hann og Jóhan Jacobsen vóru sjúkir síðsta vikuskifti. Teir vera við aftur ímóti KÍ, og tað verður Pól Jóhannus Justinussen eisini. Hann var leikbannaður í Gøtu.

– Vit hava lagt tapið í Gøtu aftur um okkum. Nú fokusera vit á KÍ dystin, og vit eiga at standa okkum betri, enn vit gjørdu ímóti Víkingi. Tað hevur stóran týdning at hava royndar spælarar í uppgerðum av hesum slagnum, og tað hava vit nú, sigur Harry Knudsen, sum er hjálparvenjari

Lagnuløtu fyri HB

HB - VÍKINGUR LARS MÜLLER
Sunnudagin kl. 18.00

Sunnukvøldið verður tað greitt, um HB framvegis skal roknast millum FM favorittarnar, ella um sigursvanda felagið fyribils skal spæla um plássini aftanfyri tey, sum bera heiðursmerki og altjóða luttøku við sær.

– Tapið ímóti B36 var stórt vónbrot. Stóran part av tíðini vóru vit ikki niðurspældir, men tað varð tungt hjá okkum at lyfta okkum aftur, eftir at teir við hepnum máli stutt undan steðginum løgdu seg framum 2-0, og 3-0 málið bar mótbrekku við sær, sum vit ikki megnaðu, sigur vongverjin Jóhan Troest Davidsen, og hann heldur fram:

– Talan er um leikliga framgongd, og hóast tað í løtuni ikki gongur eftir vild, so rokna vit avgjørt við møguleikanum. Kappingarárið er framvegis ungt, og tað ber til at venda gongdini. Tað eru nítjan umfør eftir, so vit hava ikki avskrivað okkum sjálvar, sigur Jóhan Troest Davidsen.

Um tað ikki eydnast at vinna úrtøku ímóti Víkingi og helst fulla úrtøku, so verður fjarstøðan til toppin stór. Tí er aftur hesa ferð talan um seks stiga dyst hjá HB.

Víkingarnir fara til Havnar við stórum sjálvsáliti. Eftir trilvandi byrjan hava teir tvær tær síðstu ferðirnar tryggjað sær luttøku í hálvfinaluni í steypakappingini og 5-1 sigur á toppliðnum NSÍ í landskappingini.

– Spælararnir vísa góðan hugburð, og teir eru raskir. Tað er hugaligt, at tað tvær tær seinastu ferðirnar hevur gingið betri leikliga, og at sjálvsálitið harvið hevur fingið skump rætta vegin, sigur Víkinga venjarin Sigfríður Clementsen.

Ikki minst hevur tað vist seg at hava stóran týdning fyri Víking, at Bárður J. Hansen, sum í fjør var sera eyðsýndur, er komin fyri seg eftir langan skaðasteð.

Í fjør endaðu tveir dystir millum HB og Víking við javnleiki, meðan HB vann ein dyst í Gundadali 2-1.

JOANNES@SOSIALURIN.FO

KÍ

Ivasamur:
Heðin á Lakjuni (lærkrikin)
Skaddir: Kenan Hajdarevic,
Petur Andreasen og
Ísak Simonsen.
Tøkur aftur: Jákup B. Andreasen (burturstaddur seinast)

ÍF

Ikki við: Fritleif í Lambanum (Fótliðið, ógreitt hvussu leingi),
Jan Ellingsgaard (burturstaddur)
Ivasamur: Andy Olsen (Baklær)
Við aftur: Bartal Eliasen og Adeshina Lawal

AB

Ikki við: Rógvi Poulsen (burturst.),
Teitur Jóannesarson (knæið),
Jobin Drangastein (økslin, 2 vikur - møgulig skurðviðgerð), Gert Drangastein (fóturin, 6 vikur),
Hørður M. Mohr (burturstaddur, 1 vika),
Rói Danielsen(Burturst., 2 vikur)
Við aftur: Bárður Olsen (sjúka)

TB

Ikki við: Ivan Stojkovic (karantenu)

FC SUÐUROY

Ikki við: Salmundur Bech (fóturin, ivasamt)
Ivasamir: Jón Áki Jacobsen og Høgni Madsen (baklærið)